| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 28. september2011 |
| Býráðsfundur nr. | 10/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 28. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. september 2011 um innkalling til fundar. Sambært fundaerinnkallanini hevur borgarstjórin tikið avgerð um at flyta fundin 1 dag fram frá 29. til 28. september 2011.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Gudny Vang
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 33/2011 varð viðgjørt.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 33/2011.**

***Mál viðvíkjandi 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlanarkarm fyri kommununa fyri 2012.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 09 september 2011 til fyribils fíggjarætlanarkarm fyri kommununa fyri 2012.

Vísandi til § 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 01. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 01. desember.

Skattagrundarlagið er roknað út frá upplýsningum frá Taks, har inntøkan pr. 01. september 2011 er upproknað til eitt ár við skattaprosenti 21,5. Somuleiðis er botnfrádrátturin ásettur eftir útrokningum frá Taks.
Barnatalið er 405, og barnafrádrátturin er ásettur til til kr. 4.500,00 pr. barn í 2012, móti kt. 4.000,00 fyri fíggjarárið 2011 ella ein hækking upp á kr. 500,00 pr.barn.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi 23. september 2011 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini javnvigar við kr. 61.940.880,00, og verður roknað við einum rakstraravlopi upp á kr. 982.880,00. Bert ein íløga er avsett nevniliga í nýggja dagstovnuin á Kambsdali kr. 4.500.000,00, meðan lagt verður upp til, at fyribils avlopið kr. 982.880,00 eisini eigur at verða nýtt til íløgur.

Rakstrarútreiðslurnar brutto verða mettar til kr. 46,.858.000,00 og netto til kr. 34.030.000,00, rentuútreiðslurnar ÷ rentustuðulin til kr. 4.600.000,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 5.000.000,00.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 43.812.880,00 við einum skattaprosenti upp á 21,5%, partafelagsskatturin fyribils verður mettur til kr. 5.000.000,00 og skattur av kapitaleftirlønum til kr. 300.000,00, meðan eingin inntrøka fyribils er avsett við sølu av grundstykkjum. Hesar inntøkur verða inntøkuførdar undir íløgum teknisk mál.

Nevndin metir, at kommunan kann gera samlaðar íløgur fyri umleið kr. 10,5 mió., men tá verður neyðugt at lána somu upphædd, sum avsett er til avdráttir av lánum, nevniliga kr. 5,0 mió., hækkan av kommunuskattaprosentinum ella kombinatión av báðum møguleikunum.

Fíggjarnevndin samtykt á fundinum 23. september 2011 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarkarm fyri býráðið til 1. viðgerð.

Eftir 1. viðgerðina í býráðnum verður fíggjarætlanaruppskotið viðgjørt og gjøgnumarbeitt í føstu nevndunum í samráð við stovnsleiðarar og ábyrgdarfólk.

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar. (9-0).

**Mál nr. 34/2011.**

**Umsókn um víðkan av verandi aliøki.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni , dagf. 24. august 2011 um hoyring av umsókn frá P/F Bakkafrost um víðkan av aliøkinum á Fuglafirði.

Umsóknin umfatar meira enn tvífaldan av økinum frá umleið 84.000 m2 til umleið 180.000m2.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini 20. september 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at soljóðandi hoyringsskriv verður sent Heilsufrøðiligu Starvsstovuni:

Økið, har víðkanin er ætlað at fara fram, verður nýtt til akkerspláss og innsigling til Fuglafjarðar Havn. Arbeitt verður við ítøkuligari ætlan um at servisera størri skip upp til 300 metrar til longdar og sum stinga so djúpt, at tey ikki kunnu koma til bryggju, og tessvegna verður sagt frá at Fuglafjarðar havn brúkar og kemur framhaldandi at brúka meginpartin av økinum, sum víðkanin sambært umsóknini er ætlað at umfata.

Tí verður hervið boðað frá, at havnamyndugleikarnir fyri Fuglafjarðar havn undir ongum umstøðum koma at góðtaka, at tað økið sum umsóknin umfatar, verður lagt út til aliøki vísandi til grein 12 stk. c) og d) í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m.

Grein 12 er soljóðandi:
§12. Tá aliloyvi verða givin og aliøki tillutað, skal loyvisfyrisitingin meta um áhugamálini viðvíkjandi nýtslu av økinum og undir hesum:

a) tørvin hjá umsøkjaranum,
b) møguliga nýtslu av økinum til annað alivirksemi,
c) aðra nýtslu av økinum
d) verndaráhugamál, sum ikki eru nevnd í § 11.

Kemur ein umsókn frá Bakkafrost um eina minni víðkan av aliøkinum framvið landi vilja havnamyndulelkarnir viðgera hesa.

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 35/2011.**

**Umsókn frá Vivian og Terja Nón um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211n í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Vivian og Terja Nón, dagfest 01. september 2011 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211n á garðavegi 1 í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. September 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis ***at***:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar. Kommunan skilar sær rætt til at leggja kloakkir frá sethúsunum í grannalagnum gjøgnum grundstykkið, hetta sambært tinglýstum skeyti.
7. Har grivið verður móti granna, skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at bakið verður tryggjað á nøktandi hátt og ikki hevur størri hall enn 1:1,25 og skráin er innni á teirra ogn.

8. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.
Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 36/2011.**

**Umsókn frá Jústinus L. Eidesgaard um byggiloyvi til uppíbygging til sethúsini á Hellunum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jústinus L. Eidesgaard, dagfest 21. Mars 2011 um byggiloyvi til tveir útbygningar oman og niðan úr hoyggjhúsinum á matr. nr. 935 á Rættarvegi 17 á Hellunum.

Tá ið bygningurin kemur nærri grannamarki enn 2,5 metrar er neyðugt við grannahoyring hjá Gunvør Hansen sum eigara av matr. nr. 944. Í skrivi frá henni, dagfest 17. juni 2011 verður góðtikið, at bygt verður sambært fyriliggjandi tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. September 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti sum eitt minni frávik til byggisamtyktina, soleiðis at bygt kann verða sambært fyriliggjandi tekningum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 37/2011.**

**Umsókn frá Jaspuri Eliasen um byggiloyvi til hjall og dur sunnan fyri sethúsini í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jaspuri Eliasen, dagfest 07. september 2011 um byggiloyvi til hjall og dur sunnan fyri sethúsini á matr. nr. 269 á Tróndarbrekku 6 í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. september 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi til hjall og dur verður givið sambært fyriliggjandi tekningum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 38/2011.**

**Umsókn frá Jørmundi Lambaa um byggiloyvi til hjall og dur oman fyri sethúsini í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jørmund Lambaa, dagfest 12. september 2011 um byggiloyvi til hjall og dur oman fyri sethúsini á matr. nr. 13b á Toftanesvegi 76 í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. september 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi til hjall og dur verður givið sambært fyriliggjandi tekningum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 39/2011.**

**Umsókn frá Finni Bjarnastein um byggiloyvi til hjall oman fyri sethúsini í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Finni Bjarnastein, dagfest 12. juli 2011 um byggiloyvi til hjall oman fyri sethúsini á matr. nr. 143cp á Sevdalsvegi 15 í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. september 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi til hjall verður givið sambært fyriliggjandi tekningum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.40.

Dánjal Vang

Jann Tofte gaard

Elisabeth D. Eidevig

Gudny Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen